# Kunnger› um broyting í kunnger› um útgjald av farloyvisstu›li

**§ 1.** Í kunnger› um útgjald av farloyvisstu›li, dagfest 26. november 1999, ver›a hesar broytingar gjørdar.

1) §1, stk. 1, nr. 3 ver›ur or›a› solei›is: „Kann vísa á treytaleysa setanaravtalu millum arbei›sgevara sín og tann persón, sum skal avloysa vi›komandi í farloyvisskei›num. Í setanaravtaluni skal ver›a sta›fest, at avloysarin í farloyvisskei›num skal setast eftir í høvu›sheitum somu treytum sum frammanundan farloyvisskei›num galda fyri tann, sum fer í farloyvi. Setanaravtalan kann vera tí›aravmarka›, men skal sum ta› minsta galda óbroytt í farloyvisskei›num. Avloysarin skal harumframt beint undan farloyvisskei›num í minst tríggjar mána›ir hava loki› treytirnar fyri at fáa arbei›sloysisstu›ul sambært § 14, stk. 1 í løgtingslóg um arbei›sloysistrygging og arbei›sávísing, eftir at bí›idagar sambært § 17 og møguligt tí›arskei› uttan stu›ul sambært § 18 í løgtingslóg um arbei›sloysistrygging og arbei›sávísing eru runnin."

2) § 5, stk. 3 ver›ur or›a› solei›is: „Árligi farloyvisstu›ulin er í mesta lagi 70% av eini arbei›araársløn sambært § 16, stk. 3 í løgtingslóg um arbei›sloysistrygging og arbei›sávísing, frádrigi› teimum veitingum, sum eru nevndar í § 8, nr. 1 og 2, í løgtingslóg um arbei›sloysistrygging og arbei›sávísing. Dagligi farloyvisstu›ulin er í mesta lagi hægsti árligi farloyvisstu›ul, b‡tt vi› øllum døgum í árinum vi› undantaki av leygar-, sunnu- og halgidøgum."

**§ 2.** Henda kunnger› fær gildi frá 29. mai 2000.

St‡ri› fyri Arbei›sloysisskipanina, 13. apríl 2000

Karin Kjølbro (sign.)
forma›ur

/ Elisabeth O. Gaardbo (sign.)

*ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stu›ul til arbei›sleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbei›sleysum at fáa arbei›i og at umsita arbei›sávísing fyri føroyska arbei›smarkna›in. Á ALS starvast í løtuni 23 fólk. Virksemi› hjá ALS er í høvu›sheitum lógarásett. Ovastu lei›sluna hevur st‡ri› fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbei›sgevara- og løntakarafeløgunum á arbei›smarkna›inum - ver›ur valt av Føroya Landsst‡ri.*

ALS
Arbei›sloysisskipanin
P.O.Box 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 319550 • Fax 310263
teldupostur: als@als.fo

## Undirvísingar- og Mentamálastýrið

# Lærarastørv í Fólkaskúlanum

Niðan fyri nevndu lærarastørv eru leys at søkja til setanar **1. august 2000**.

**Norðoya skúladømi I**: Klaksvíkar, Hvannasunds, Viðareiðis og Kunoyar Kommunur:
Klaksvíkar kommuna:
*Skúlin við Ósánna:* 1 lærari
*Skúlin á Ziskatrøð:* 1 lærari

**Fugloyar kommuna:** 1 útoyggjalærari

**Eysturoyar skúladømi skúladømi II**: Skála, Sjóvar, Oyndarfjarðar, Runavíkar og Nes kommunur:
Skála kommuna: 1 lærari
Sjóvar kommuna: 1 lærari
Runavíkar kommuna: 3 lærarar
Nes kommuna: 2 lærarar

**Eysturoyar skúladømi III**: Kommunurnar, ið eru saman um Felagsskúlan á Oyrarbakka:
Felagsskúlin á Oyrarbakka: 1 lærari

**Streymoyar skúladømi I**: Vestmanna og Kvívíkar kommunur:
Vestmanna kommuna: 1 lærari
Kvívíkar kommuna:
*Kvívíkar skúli:* 1 lærari

**Streymoyar skúladømi III**: Tórshavnar, Nólsoyar og Kirkjubøar kommunur:
Tórshavnar kommuna:
*Kommunuskúlin:* 1 lærari
*Eysturskúlin:* 3 lærarar
*Venjingarskúlin:* 1 lærari
*Sankta Frans skúli:* 2 lærarar
*Argja skúli:* 2 lærarar
Hoyvíkar skúli: 3 lærarar

**Vága skúladømi:**
Sørvágs kommuna: 1 lærari
Miðvágs/Sandavágs kommunur: 1 lærari

**Suðuroyar skúladømi II**: Upptøkuøkið til 8.–10. flokk í sunnaru helvt:
Hovs kommuna: 1 lærari við 20 tímum

Har einki tímatal er viðmerkt, verður roknað við fullum tímatali.

Umsøkjarar skulu hava fólkaskúlalæraraútbúgving.

Setanarøkið er undir Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, Fólkaskúladeildini, við starvsstaði í nevnda skúladømi og við fyribils tænastu í nevnda skúla/nevndu skúlum.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

Størvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tann, sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsókn, sum verður skrivað á oyðublað, ið fæst frá Undirvísingar- og Mentamálstýrinum, skal verða send **Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, Falkavegi 6, postrúm 3279, 110 Tórshavn**, skjótast til ber og soleiðis, at hon er Undirvísingar- og Mentamálastýrinum í hendi **í seinasta lagi mánadagin 12. juni 2000**. Við umsókníni eiga at verða løgd ljóstøk av próvbrævi og møguligum viðmælum.

Teir umsøkjarar, ið søkja størv í fleiri kommunum, mega skriva eina umsókn til hvørt starv, ið søkt verður.

*Tórshavn, 25. mai 2000*
**Undirvísingar- og Mentamálstýrið**
**Fólkaskúladeildin**

# Krosstein

Pf. Svend

## Handilslærlingur

**Hevur tú hug at útbúgva teg innan sølu av tilfari til hitaverk, sanitet, baðirúmsútbúnað og líknandi, hava vit í dag eitt læurupláss leyst at søkja.**

**Tú kemur at arbeiða innan øll økir í søluliðnum í fyritøkuni, so sum goymsluarbeiði, avgreiðsla og vegleiðing av kundum, útrokning av tilboðum og innkeyp við meira.**

**Eftir lokna lærutíð eru góðir møguleikar fyri framhaldandi arbeiði. Eisini gevur henda útbúgvingin góðar møguleikar fyri víðari útbúgving á mongum økjum.**

**Hevur tú HH er lærutíðin uml. 2 ár og hevur tú FHS er lærutíðin 3 ár.**

**Ætlanin er at tú skalt byrja skjótast gjørligt, men vit bíða fegin eftir rætta umsøkjaranum, so um tú verður liðug/ur við skúlan í summar, ert tú vælkomin at søkja.**

**Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Svend Krosstein.**

**Hevur hetta tín áhuga, so send okkum eina umsókn saman við prógvum og viðmælum innan 09.06.2000.**

**Falkavegur 6 - FO 110 Tórshavn**
**Tel. 314600 - Fax 314601**
**Teldupostur: sk@post.olivant.fo**

Sosialurin - 311820

# Kappríðing



Tilmelding til kappríðingina á Leynavatnsstevnuni, sum verður leygardagin 3. juni 2000 kl. 18.00, er á telefon 315242, 421643 og 328029 til týskvøldið 30. mai kl. 20.00.

Kravt verður at ríðarar, bæði ung og vaksin, nýta góðkendan hjálm til kappríðingina.

**Føroya Ríðingarfelag**

# Bilur til sølu

Ein svartur Toyota Carina, árg. nov. 97, til sølu. Hevur aircondition og el-rútar.

**Tlf. 455203**



# Pedagogar

**Býlingshúsið á Flat søkir eftir 4 pedagogum.**

**Størvini**
Talan er um eitt pedagogstarv, 40 tímar um vikuna, í vøggustovu við 12 børnum. Tvey pedagogstørv, 30 tímar um vikuna, á barnagarðsstovu við 21 børnum. Og eitt pedagog farloyvisstarv í eitt ár, 35 tímar um vikuna, á barnagarðsstovu við 21 børnum.

**Vit bjóða**
áhugaverd størv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur ein stóran leiklut í gerandisdegnum.

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt og er førur fyri at taka avgerðir í arbeiði sínum.

**Setunarviðurskifti**
Størvini verða sett tann 1. august 2000 ella eftir nærri avtalu. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Katrin Joensen, dagstovnaleiðara tlf. 318371, ella Katrin Petersen, samskipara, tlf. 31560.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Býlingshúsinum á Flat, Per Mohrsgøta 11, 188 Hoyvík, í hendi í seinasta lagi 13. juni 2000. Tilskila á umsóknina hvat starv tygum søkja.

# Pedagogar og hjálparfólk

**Frítíðarskúlin hjá Tórshavnar kommunu søkir eftir pedagogum og hjálparfólkum**

**Vit bjóða**
Vit bjóða eitt spennandi starv, til ansingarskipanina fyri børn í skúlaaldri. Í arbeiðinum, sum hevur nógvar avbjóðingar við sær, verður dentur lagdur á at veita børnunum eitt spennandi og mennandi frítíðartilboð á einum tryggum sosialum grundarlagi.

**Vit ynskja**
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt, er kreativur og førur fyri at taka avgerðir í arbeiði sínum.

**Setunarviðurskifti**
Størvini verða sett 7. august 2000 ella eftir nærri avtalu. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

Um pedagogar ikki verða settir í pedagogstørvini, verða hjálparfólk sett ístaðin í tíðaravmarkað starv.

**Meira fæst at vita**
Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Manbjørn Mortensen, samskipara, tlf. 214678.

**Umsókn**
Umsóknir, saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 15. juni 2000.

Tórshavnar kommuna



# Fróðskaparsetur Føroya

## Hægri lestur á Føroyamálsdeildini 2000-2002

Í september byrjar exam.art.- og cand.phil.-lestur í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum.

**Exam.art. í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum.**
Lesturin tekur tvey ár og er skipaður helvt um helvt í ein máltátt og ein bókmentatátt, umframt vísindaástøði og samskifti.

Endamálið við lestrinum er at ogna sær kunnleika til føroyskt mál og føroyskar bókmentir í eldri og nýggjari tíð. Onnur norðurlendsk mál og norðurlendskar bókmentir eru partar av lestrinum.

Upptøkutreytir eru students- ella HF-prógv. Onnur samsvarandi útbúgving kann góðtakast eftir umbøn í hvørjum einstøkum føri.

**Cand.phil. í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum.**
Námið er tvey ára framhaldslestur fyri tey, ið frammanundan hava lokið exam.art.- prógv í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum, og veitir serkunnleika í útvaldum málsligum og bókmentaligum evnum.

Upptøkutreyt er exam.art.-prógv í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum.

Umsóknarfreistin til bæði námini er 30. juni 2000.

Nærri upplýsingar og umsóknarbløð fáast á:

**Føroyamálsdeildini**
**Fróðskaparsetur Føroya**
**V. U. Hammershaimbs gøtu 16**
**100 Tórshavn, tlf. 315304, fax 318448**
og á
**www.sleipnir.fo/setur/fmd**

# Tímalærari til Fiskivinnuskúlan

Søkt verður eftir tímalærara/um í

**støddfrøði á C og B-stigi (5+5 t/v)**

at byrja á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna 1. august 2000.

Umsøkjarar skulu hava prógv frá lærdum háskúla e.l., sum gevur førleika at undirvísa í lærugreinini.

Tímarnir verða løntir samsvarandi tímalærarum á studentaskúla og HF-skeiðunum.

Umsókn skal skrivast á serligt umsóknarblað, sum fæst á Fiskivinnuskúlanum ella á Undirvísingar- og Mentamálastýrinum. Meira fæst at vita við at venda sær til skúlastjóran á Fiskivinnuskúlanum.

Umsóknir við ljósprentum av próvskjølum v.m. skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 9. juni 2000.

**Fiskivinnuskúlin**
Postrúm 96
350 Vestmanna
Tlf. 42 45 73
Teldupostur: fiskvest@fiskvest.fo

# Suðuroyingar!

Alt VVS-arbeiði verður gjørt skjótt og fyri rímuligan prís.
Orkusparandi Thermomatic oljufýr fáast nú fyri einans kr. 3.200.

**Sp/f Poul Hammer**
**Tlf. 372003 / 282941**

# Lýsing

**Viðvíkjandi gamla kirkjugarði í Vestmanna**

Eftir at kirkjugarðsnevndin hevur verið og sýnað kirkjugarðin, er nevndin komin ásamt um at heita á avvarðandi um at lata við seg koma, um tey hava nakað ímóti at betongkantar, trækantar og aðrar girðingar á ikki viðlíkahildnum grøvum verða tiknar burtur.

Hetta verður gjørt fyri at lætta um viðlíkahaldið av kirkjugarðinum. Freistin at gera vart við seg er sett til 14 dagar.

**Kirkjugarðsnevndin**

# Randarhús Millum Gilja

Um hóskandi boð fæst verða eini randarhús Millum Gilja lýst til sølu. Húsini eru bygd í 1988/89, hava krúpikjallara, 2 hæddir og loft.

Stovuhæddin er 69 $m^2$, miðhæddin er 59 $m^2$ og loftið er 30 $m^2$. Grundøkið er 232 $m^2$ til støddar. Gjørt er framman og aftan fyri húsini.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til

**Advokatskrivstovuna, Fr. Petersensgøta 9**
att.: Fríða Patursson, adv

Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Christian Andreasen, adv.
Magnus S. Petersen, adv.
Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**